# Robinho vil verða meistari

Manchester City hevur stórar ætlanir fyri framtíðina, men úrslitini hava higartil ikki verið so góð, sum tey í felagnum høvdu ynskt sær. Brasilski stórspælarin Robinho hevur tó ikki mist mótið.- Í ár hava vit ikki kunnað vunnið meistaraheitið, tí vit byggja eitt nýtt lið upp, men næsta ár fara vit eftir gullinum í Premier League, sigur Robinho. Spurningurin er so, hvørjar handlar City fer at gera í summar fyri at røkka tí málinum.



# Celtic bjóðar Owen kjans

Michael Owen hevur í ár drigist við skaðar og hevur ongantíð av álvara rakt gamla formin og málið, sum hann ynskti. Nú bjóðar Celtic seg fram sum nýtt felag hjá Owen. Celtic skal verða sinnað at gjalda Owen nógvar pengar fyri hvønn dyst hann spælir, og fyri hvørt mál hann skjýtur. Men næstu vikuna hevur Owen úr at gera við at hugsa um at bjarga Newcastle lívinum í Premier League.

# gva sítt virði



*Karoly Potemkin, sum her sæst í dysti móti HB, hevur verið flúgvandi í ár. Fyrstu seks umførini hevur hann skotið átta mál*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Okkara meting

Károly Potemkin hevur seinastu tvey árini prógvað, at hann er ein hin vandamesti framherjin í føroyum fótbólti. Ungarin hevur havt fleiri upp – og niðurtúrar á sínari leið upp á tindin, men tað tykist ikki ávirka hann longur. Hann er ikki serliga skjótur á fyrstu metrunum, men stórur og vælvaksin, sum ger, at hann stendur seg millum tungu føroysku verjuleikararnar. Hann skal ikki hava ov nógv pláss, og tað vísir seg, at flestu málini, hann hevur skotið, eru úr brotsteigarøkinum. Og tað ger hann við bæði fótinum og høvdinum.

Størsti trupulleikin hjá Potemkin eru misnýttu málmøguleikarnir. Framherjin er vitandi um trupulleikan og staðfestir, at hann skuldi havt skotið 10 ella 11 mál higartil í hesum kappingarárinum. Hann er ikki so arbeiðssamur, men er altíð við í framrættaða spælinum. Sjálvsálit og spæligleði hevur ovurhondsstóran týdning fyri Károly Potemkin, tí hann hevur áður víst í Føroyum, at hann hevur tað torført í mótgongd.

## FAKTA

**Navn:** Károly Potemkin
**Aldur:** 31 ár
**Føddur:** 19. juni, 1977
**Tjóðskapur:** Ungarn
**Hædd:** 1,88 m
**Vekt:** 84 kg
**Pláss:** Framherji

**Yrkisleiðin:**
1994-2000: BVSC Budapest, 17 mál
1999: Ferencvárosi TC, leigusáttmáli, einki mál
2000-2002: FC Tatabánva, 2 mál
2002: FC Fót
2002: Rákospalotai EAC, 15 mál
2003: Szombathelyi Haladás, 1 mál
2003-2004: BFC Siófok, einki mál
2004-2005: Békescsaba SE, 1 mál
2005: Kecskeméti TE, 4 mál
2006: Vecsési FC, 4 mál
2006-2007: Dunaújváros FC, 5 mál
2007: EB/Streymur, 3 mál
2008: B36, 9 mál
2008-2009: NSÍ, 13 mál

seg EB/Streymur, og fyrireikar seg millum annað til fyrstu steypafinaluna í søguni.

- Eg fekk bara tveir dagar at umráða meg í, og valdi at taka av. Tað var ein nýggj avbjóðing, og eg setti mær fyri í øllum førum at royna tað. Eg visti, at eg skuldi prógva mítt virði av nýggjum, og tað sá eg ikki sum afturstig, sigur Károly Potemkin, sum skeyt tvey mál fyri samanlagda felagið úr Sundalagnum í 2007.

### Vil verða fótbóltsvenjari

Í summar fer Károly Potemkin at hátíðarhalda sín føðingardag í Runavík. Tá verða árini 32 í tali, og ungarski framherjin er ikki heilt ungur sum fótbóltsleikari longur. Men tað hevur hann hugsað um.

Potemkin ætlar sær í næstum undir venjaraútbúgving.

- Eg vil fegin royna meg sum høvuðsvenjara. Tað er ein dreymur. Ætlanin er fáa neyðugu venjarapappírini í Ungarn. Eg havi hugsað um at búsett meg í Føroyum í nøkur ár, og tí er møguleiki fyri, at mítt fyrsta venjarastarv verður her, greiðir Károly Potemkin frá, sum sjáldan hevur sovið betur enn hann ger í Runavík í løtuni.

### Ætlar at verða verandi

31 ára gamli Károly Potemkin er á sínum hæddarpunkti á yrkisleiðini í føroyskum fótbólti. Hann er millum vandamestu framherjarnar í Vodafonedeildini, har hann er toppskjútti og stuðulsleikari hjá verandi oddaliðnum.

Men hvørjar ambitiónir hevur Károly Potemkin?

- Eg havi sett mær bæði stór og smá mál, sum eg vil røkka. Eg eri ikki heilt óroyndur, tí eg havi spælt fleiri enn 1000 fótbóltsdystir í mínum lívi. Tað er nú umráðandi fyri meg, at eg avriki hvørja ferð. Sjálvandi droymi eg um eitt føroyameistaraheiti og heitið sum toppskjútti, men eg geri einki einsamallur. Eg eri ein liðspælari í eini liðítrótt, sigur Károly Potemkin, sum sær tað sum ein møguleika at enda sína yrkisleið sum fótbóltsleikari í Føroyum.